

*Tað er her uppi á Gadd á Nesi í Eysturoy, at Blái Krossur skal byggja nýtt viðgerðarheim. Útsýnið er eitt tað besta í øllum landinum, har bæði sæst í ein norðan, vestan og ein sunnan*

*Mynd: Kári Mikkelsen*

# Stuðulskonsert fyri blákrossheim

**Leygarkvøldið 8. november verður ein stór stuðulskonsert í Vesturkirkjuni til frama fyri nýtt Blákrossheim. Tey, sum luttaka, eru Jens Lisberg, Martin Joensen, Kristel Lisberg og VOX**

Jens Lisberg er kendur í føroyska tónleikaheiminum. Í sera nógv ár hevur hann verið at hoyrt saman við bólkinum Sputnik, men tey seinastu árini hevur hann skapt sína egnu tónleikakarrieru. Stílurin er country, og hann verður eisini av nøkrum nevndur Mr. Country.

Martin Joensen er ikki minni kendur. Hann hevur millum annað spælt við Vestmonnum, og seinastu árini hevur hann eisini roynt seg á egnum beinum, sum hann hevur megnað til fulnar. Hann er ein av okkara bestu sangskrivarum og eigur hann eitt ótal av 'landaplágum'. Eitt tað besta prógvið, at hansara sangir eru vorðnir fólkaogn, er sangløtan á G!festivalinum fyri hálvum øðrum ári síðan, har Martin sjálvur leiddi felagssangin. Ein stúgvandi fullur Gøtusandur sang við í løgunum hjá Martini.

Kristel Lisberg er dóttir Jens, og hevur hon, hóast sín unga aldur, sungið sera nógv. Millum annað saman við pápa sínum. Kristel hevur ein lættan country stíl. Á konsertini fer hon eisini at syngja saman við VOX.

VOX er eitt gospelkór, sum hevur sungið saman í 10 ár. Stílurin er nútímans gospel við íblástri frá fleiri myrkum gospelsangarum úr Amerika. Kórið hevði eina framúr góða og sannførandi konsert í Norðurlandahúsinum herfyri, har ummælini vóru sera góð. Umframt at syngja kór hjá Kristel og Martini, fer VOX eisini at framføra nakrar av sínum egnu sangum.

Á konsertini verður savnað inn til nýggja Blákrossheimið, sum ætlanin er at byggja á Gadd á Nesi. Verandi viðgerðarheim fyri fólk við rústrupulleikum er gamalt og ótíðarhóskandi, og stórur tørvur er á betri umstøðum. Grundøkið er gjørt byggibúgvið, og klárt er at byggja. Men fyri at byggingin kann byrja, er neyðugt við einum tryggum fíggjarligum grundarlag. Fyri at fáa ein part av fíggingini til vega, hava Jens Lisberg og onnur tikið stig til hesa stuðulskonsertina.

Nýggja Blákrossheimið, sum ætlanin er at byggja, verður á leið 800 fermetrar til støddar. Har verður rúm fyri 15 fólkum í viðgerð í senn, umframt góðir møguleikar fyri ambulantari viðgerð. Metti kostnaðurin er 10 milliónir krónur. Fyri at byggingin skal kunna byrja, skulu einar 2-3 mió. fáast til vega afturat.

Stuðulskonsertin verður í Vesturkirkjuni leygarkvøldið 8. novembur klokkan 20. Tað er ókeypis at koma á konsert, men høvi verður at geva eina gávu til nýggja Blákrossheimið.

# Ungdómspolitisk feløg til Finnlands

**Fimm umboð fyri politisku ungdómsfeløgini, HUXA, Unga Samband, Sosialistisk Ungmannafelag og Unga Tjóðveldið fóru í gjár til Finnlands, har tey fara at luttaka á árligu setuni hjá Ungdommens Nordiska Råd**



*Rógvi Nybo, Bjørk Olsen, Miriam Michelsen og Rói Bjarnason Poulsen*

**POLITIKKUR**
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Á hvørjum ári, í eitt vikuskifti um mánaðarskiftið frá oktober til november, skipar UNR fyri setu, har ungdóms og ungdómspolitisku feløgini í øllum norðurlondum hittast at viðgera aktuell mál, ið eru viðkomandi fyri norðurlendska samstarvið, ið fevnir um millum annað útbúgving, umhvørvi og fíggjarpolitikk.

Setan er skipað sum ein tingseta, har hvørt felagið hevur atkvøðurætt, og har atkvøtt verður um tey mál, ið verða løgd fram á setuni.

Tey mál, ið verða samtykt, verða síðan tikin upp til viðgerð á fundunum hjá Norðurlandaráðnum, ið eru vikuna eftir.

Føroyingar eru eisini umboðaðir á setuni hjá UNR, og hesuferð verða tað fimm umboð úr politisku ungdómsfeløgunum HUXA, Unga Samband, Sosialistisk Ungmannafelag og Unga Tjóðveldið, ið koma at umboða Føroyar.

Tey umboðini eru Bjørk Olsen og Rói Bjarnason Poulsen fyri HUXA, Miriam Michelsen fyri Unga Samband, Una Egilsdóttir fyri Sosialistisk Ungmannafelag og Rógvi Nybo fyri Unga Tjóðveldið.

Hesi koma so at mynda føroysku luttøkuna á hesari setuni hjá Ungdómsnorðurlandaráðnum, UNR.

# Øll 25-oyruni til gransking

**Meir enn sjey 25-oyru fyri hvønn føroying megnaði Sclerosufelagið at savna inn seinasta hálva árið. Bússurn hava staðið í handlum kring landið og nú 25-oyruni eru tikin úr nýtslu, er peningurin samantaldur**

**INNSAVNING**
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Málið var upprunaliga at fáa eina krónu inn, fyri hvønn íbúgva í Føroyum, men tað eydnaðist at fáa heilar 92.944,50 kr inn, í 25-oyrum svarar hetta til 371.778 myntir.

Sclerosufelagið hevur avgjørt, at peningurin verður latin til gransking, so tey, ið líða undir progressivari sclerosu kunnu njóta gott av honum.

Í verandi løtu er eingin viðgerð fyri hesa sjúku, ið gevur sjúklinginum so líðandi viknaðan førleika. Finn Sellebjerk, yvirlækni á Ríkissjúkrahúsinum stendur á odda fyri granskingarverkætlanini, ið arbeiðir fram móti at hjálpa júst hesum sjúkuraktu. Samstarv er eisini við altjóða granskarar úr Wien og Oxford.

- Tað er fløvandi at vita, at fleiri kilo av myntum frá fólki kring landið, fara til eitt arbeiði, sum kann geva heilt nýggja vón fyri framtíðini, sigur Mogens Eriksen vegna Sclerosufelagið. Hann vil eisini nýta høvið at takka teimum, ið hava latið pening í bússurnar og teimum handlum, ið hava havt tær standandi.





*Mogens Eriksen frá Sclerosufelagnum við innsavnaða peninginum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*